

# Gyklarar við lírukassa

Tað er nógv lív í miðbýnum í Stavanger. Tað kemur tað ofta fyri at ein gyklari stendur og vindur tónleik úr einum lirekassa, ella sum tað eitur á føroyskum, lírukassa. Ein lírukassi er eitt mekaniskt ljóðføri, sum mest verður nýtt av gyklarum og landastrokum, sum skaffa sær nøkur oyru við at vinda eitthvørt lag úr lírukassanum. Fólk, sum koma framvið, leggja ofta smápengar í eitthvørt sum lírukassamaðurin hevur sett við vegin til tað sama. Í Italia fáa teir lirar frá teimum sum koma framvið. Lírukassin er eitt gamalt ljóðføri, sum varð sera nógv nýtt fyrr í tíðini.



















